Jákup hevur tað sum blomman í egginum

Landsliðsspælarin í OB, sum mánadagin var álopsspælari á eykaliðnum, dugir einki at siga um møguleikarnar fyri at sleppa framat á besta liðnum

ÚTISETI
Jóannes Hansen



Jákup á Borg stórtrívst í Odense

Jákup á Borg er framvegis í OB. Enn hevur hann ikki fingið møguleikan á besta liðnum. Men Jákup hevur ikki mist mótið, og sær sjálvum líkur so leggur hann alla ta megi og orku í, sum tað ber til, fyri at røkka longri upp á fótbóltsstiganum í Odense.

– Tað, sum eg veit, er, at leigusáttmálin millum HB og OB verður liðugur um ein mánað. So skal eg aftur til Havnar at spæla við HB. Annað veit eg ikki. Men eg skal ikki dylja, at eg stórtrívist í OB, og at eg avgjørt einki hevði havt ímóti at hildið fram sum fulttíðar yrkisspælari. Tað er optimalt sum fótbóltsspælari, og tað er eisini ein nýggj og spennandi støða fyri okkum sum familja at liva upp á henda mátan her í Odense.

Hvussu tá?

– Í Føroyum ber tað at vera fótbóltsspælari við sær, at tú, umframt at vera upptikin av dagliga arbeiðnum, eftir arbeiðstíð ert nógv burturi heimanífrá til venjingar og dystir. Í OB er tað soleiðis, at vit summar dagar venja eina ferð, og aðrar dagar venja vit tvær ferðir. Restina av tíðini ræður tú sjálvur yvir. Sjálvandi er tað sera týdningarmikið við hvíld og svøvni. Men tað sigur seg sjálvt, at vit sum familja hava nógv meiri tíð saman, enn vit hava verið von til.

Venur seg við nýggjan leiklut

Í B36 hevur Jákup á Borg verið millum lyklaspælararnar so at siga, síðani hann var nóg gamal at spæla millum teir vaksnu. Nú hevur hann sáttmála við HB, og grannarnir fyri norðan hava neyvan keypt hann, tí teir ætla, at hann skal sita á beinkinum.

Í Odense bíðar Jákup enn eftir møguleikanum at royna seg í superliguni. Sunnudagin var hann við liðnum í Árhus. Hann var á beinkinum allar 90 minuttirnar. So tætt at liðnum hevur hann ikki verið áður. Men Jákup hevur onga hóming av, um hann fer at vera við ímóti FCK. Todi Jónsson og liðfelagarnir fara næstu vikuna at spæla tvær ferðir á Odense stadion. Leygardagin skulu teir spæla landskappingardyst, og mikudagin verður seinna hálvfinalan í steypakappingini millum OB og FCK.

Mánadagin spældi Jákup á Borg á eykaliðnum hjá OB. Á Odense stadion spældu teir ímóti AaB. Heimaliðið vann 2-1, og Jákup var á liðnum alla tíðina.

Síðani hann kom til OB, hava venjararnir gjørt av, at Jákup skal roynast sum vongverji. Har hevur hann spælt bæði á eykaliðnum og á seriuliðnum. Ímóti AaB var hann í álopinum, og tað var bara síðsta hálva tíman, at hann varð fluttur aftur á vongverjan. Frammanundan hevði Jákup bara roknað við, at hann skuldi spæla á vongverjanum.

– Á vongverjanum í høgru var ein, sum eitur Michael Larsen. Nú veteranurin Steen Nedergaard er vøddaskaddur, er kapping um bakkplássið. Vit fáa ikki so nógv at vita. Men eg havi bara gingið út frá, at eg gardering á bakkplássinum, tá ið vit vóru í Árhus. Hesin Michael Larsen hevur fingið møguleikan frammanundan, men hann var ikki úttikin til dystin í Árhus. At hann nú spældi á bakkinum á eykaliðnum, meðan eg var fluttur fram í álopið, kann takast sum ábending um, at teir ætla at geva honum nýggjan møguleika á hesum plássinum, tá ið OB fer at spæla ímóti FCK.

Tað vil siga, at vánirnar hjá tær eru ikki so góðar?

– Tað dugi eg einki at siga um. Hjá mær ræður um at gera mítt besta, tá ið vit venja, og tá ið eg fái møguleikan at spæla.

GÍ heldur fram at samstarva við Kall og Kaupthing

TÍÐINDASKRIV

Samstarvið heldur fram millum GÍ og Kall og GÍ og Kaupting

Aftaná landskappingardystin millum GÍ og ÍF, sum var í Gøtu sunnudagin undirskrivaði GÍ nýggjar sponsoravtalur við Kall og Kaupthing.

Kall hevur verið ein av høvuðssponsorunum hjá GÍ síðan 2002, og er serstakliga sjónligt í Gøtu við tí sum helst er landsins longsta bandalýsing. Bjarni Bjarnasson, stjóri á Kall, sigur, at eksponeringin gjøgnum GÍ hevur verið positiv, og tað kann helst staðfestast, at henda hevur givið úrslit.

Kaupthing hevur verið høvuðssponsor hjá GÍ síðan 2000, og verður framvegis at síggja framman á leikbúnum hjá GÍ. Petur Holm, stjóri hjá Kaupthing, sigur, at GÍ manglaði ein høvuðssponsor í 2000, tá Kaupthing byrjaði í Føroyum, og hevur lýsingaravtalan við GÍ síðani tá verið ein týðandi sjónliggerð av Kaupthing. Serliga nú, tá Kaupthing hevur skift búmerki, hevur hendan avtalan týdning.

Brandur Jacobsen, nevndarlimur hjá GÍ, sum hevur ábyrgd fyri sponsorum og stuðlum, sigur, at nýggju avtalurnar eru eitt framhald av einum vælvirkandi samstarvi, sum hevur stóran týdning fyri Gøtu Ítróttarfelag. Tað hevur verið eitt mál fyri nevndina hjá GÍ at gera langtíðar samstarv við sponsorar til gagns fyri báðar partar, og tað tykist sum hetta hevur eydnast.



Til Sølu

Sera væl viðfarin Honda Accord

- Honda Accord 1,8i
- Árg 10/99
- Sera væl viðfarin

Lagalig fígging

Sosialurin 314180

Bilfríðkan
Velbastavegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 ella 21 73 00

Vælhildin Honda Accord til sølu

Sosialurin 314180

Honda Accord 1,8i til sølu.
Bilurin, sum er sera vælhildin, er frá august 1998, hevur koyrt km. 67.000.

El-rútar, sleipikrók. píkadekk, og góð heilársdekk á felgum fylgja við.

Tel. 313799 - 221158

Kokkur

Søkt verður eftir royndum kokki at standa fyri matgerðini í køki okkara at byrja beinanvegin ella sambært nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl. 08 til uml. 14.00.

Keypmaðurin »úti í Grønlandi«
Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16 · 100 Tórshavn
Tlf. 312087

Arbeiðshandskar

til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Læsarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 314180

Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

Fysioterapeutar

Søkt verður eftir:

- Einum fysioterapeuti til fulltíðarstarv frá 1. juni 2004.
- Einum avloysara fyri fysioterapeut til fulltíðarstarv í tíðarskeiðinum frá 1. juni 2004 til 31. mars 2005.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til John Rødgaard leiðandi fysioterapeut tlf. 37 11 33 lokal 115 ella 116.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Fysioterapeutfelag Føroya.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

Umsjónarmannin
Suðuroyar Sjúkrahús
Postboks 51
800 Tvøroyri

innan 13. mei 2004.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin